# Vøddamýkjarar fingið prógv

*Fyrstu føroysku vøddamýkjararnir hava fingið prógv, eftir at hava sitið á skúlabonki og roynt seg við mýkingarbonkin í eitt ár*

DAGFINN OLSEN

Í eitt ár hevur danin Jens Melgaard hildið skeið fyri føroyskum næmingum, ið hava havt áhuga í vøddamýking.

Herfyri fingu 15 kvinnur og ein maður handað prógv á Hanilsskúlanum í Havn.

Í eitt ár hava tey lært kropslæru (anatomi) á skúlabonki og annars roynt seg við mýkingarbonkin.

Tey hava havt fleiri sløg av massasju ella vøddamýking. M.a. avspennandi andlitsmassasju, ryggmassasju og viðgerð og tað, ið á donskum nevnist „dybdeafspændende“ andlitsmýking.

Nýggju vøddamýkjararnir kunnu taka sær av alskins trupulleikum, men sjálvsagt teir eisini forkelað tann, ið leggur seg á bonkin, um hesin bert hevur brúk fyri at slappa av, eftir harðan dag.



*Nýggju føroysku vøddamýkjararnir* **Mynd: Jonhard Hammer**



*Nýggju vøddamýkjararnir hava hollan kunnleika og kunnu bæði forkela fólk og taka sær av ymsum trupulleikum* **Mynd: Jonhard Hammer**

Jens Melgaard letur væl at fyrstu føroysku vøddamýkjarunum. Hann sigur, at sum næmingar hava tey verið væl fyri og seriøs. Hetta metir hann borgar fyri, at tað eru góðir mýkjarar, ið føroyingr nú hava møguleika at vitja.

Jens Melgaard sigur, at sjálvsagt skal ein ávís siðvenja arbeiðast inn. Í Danmark eru tey von við vøddamýking og at leita sær til slíkar serfrøðingar. Í Føroyum hevur hetta ikki verið gjørligt og tí ikki vanligt. Men Jens Melgaard væntar, hetta óivað verður øðrvísi nú.

Jens Melgaard sigur, at møguliga verður tikið ímóti nýggjum liði av mýkjarum á skúlabonkin um eitt ella tvey ár.

Nýggju mýkjararnir eru: Joan Jacobsen, Katrin í Gerðinum Olsen, Anna Maria Poulsen, Hildibjørg Wang, Geir Wardum, Hanna Jacobsen, Mena Müller, Guðny Jacobsen, Súsanna Olsen, Margee Dam, Jakobina Johannesen, Alice Simonsen, Annika S. Johannesen, Haldis E. Samuelsen, Martha Dalsgaard. Maria Svabo Samuelsen (vantar á myndini).

---

# Egon farin frá



*Formaðurin hevði ikki meiriluta aftan fyri seg, tá hann tók undir við teimum, ið heittu á Føroya Løgting um at leggja upp í ósemjuna millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið*

Á fundi mánadagin 10. apríl 2000 varð staðfest, at ein meiriluti í Tórshavnar Skúlaráð er ímóti áheitanini hjá »Formansskapinum fyri skúlanevndirnar fyri framhaldsdeildirnar í Føroyum« um at senda áheitan á Føroya Løgting um at taka stig fyri at loysa ósemjuna millum Lærarafelagið og Fíggjarmálastýrið/Undirvísingar og Mentamálastýrið. Hetta er í skrivi boðað frá til Finnboga Ísaksson, tingformann.

Egon Øregaard er samdur í, at rættast er, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum sjálvir skulu loysa ósemjur partanna millum. Men í hesum førinum gongur ósemjan út yvir tann partin í samfelagnum, sum er ómyndugur og sum er okkara felags framtíð, børnini. Børnini eru ómyndug og kunnu tí ikki sera fram krøv mótvegis myndugleikum og fakfeløgum.

Av tí at fyrrverandi formaðurin í Tórshavnar Skúlaráð, Egon Øregaard, hevur tikið fult undir við »Formansskapinum« og framvegis ger tað í áheitanini á Føroya Landsstýri og Føroya Lærarafelag, og í aðru syftu á Føroya Løgting, hevur hann lagt frá sær sum formaður í Tórshavnar Skúlaráð.



# Áminning um nýggju ólavsøkukantatuna

*Handrit skulu vera latin inn í seinasta lagi 1. mai 2000*

Fyri jól varð boðið til kappingar um nýggja, alternativa ólavsøkukantatu at verða framførd við túsundáraskiftið nú á ólavsøku.

Kórsamband Føroya minnir nú á, at handrit til hesa kapping skulu vera skrivara kórsambandsins, Palla Askham, Vestmanna, í hendi í seinasta lagi mánadagin 1. mai.

Viðløgdu treytirnar um hesa kantatu vóru:

1. Hon skal ikki vera torførari at syngja, enn at hon skal kunna framførast við vanligum kórsangarum eftir 4–5 venjingum.
2. Hon skal í framførslu vara í 10-12 minuttir.
3. Hon er í fyrsta lagi hugsað sum eitt a cappella verk til uttandura framførslu; men høvilig ljóðføri kunnu eisini setast til.

Eftirsum flestu limirnir í dómsnevndini verða útlendingar, verður biðið um, at teksturin til kantatuna frammanundan verður sendur til Palla Askham í Vestmanna til greinandi viðgerð.

# Koyrt hýruvogn í 15 ár

Í dag, 12. apríl 2000, eru 15 ár síðani, at Olaf Ludvig í Havn byrjaði at koyra hýruvogn.

Hann fór undir akstursvirksemi og setti á stovn Havnar Taxi. Hann er einsamallur í fyritøkuni og hevur m.a. gjørt vart við seg við skemtiliga herrópinum: Havnar Taxi - altíð *ein* bil! Og tað er so satt sum tað er sagt.

Olaf sigur, at tað til tíðir er strævið at koyra hýruvogn, tí dagarnir kunnu ofta gerast langir. Mest er at gera um náttina og í vikuskiftunum.

Hóast Olaf nú hevur koyrt í 15 ár, so ætlar hann sær at halda fram enn nøkur ár, so havnarfólk framvegis hava ein bil at heita á.

*- do -*



**Mynd: Jens Kristian Vang**